## DAGSINS MEINING

# Ferðslukaos og planloysi

Nú summarið er komið og mangir gestir vitja høvuðsstaðin sæst, hvussu trongligt er í býnum orsakað av tí vaksandi ferðsluni. Tað gav at býta mikudagin, tá Norrøna skuldi fara túr. Eitt skifti var veruligt ferðslukaos í býnum. Frá Bispagarðinum og út á rundkoyringina við Skansan var nærum ein samanhangandi røð av osandi bilum. Hetta er kanska ikki gerandiskostur, men eigur tað kortini at geva býarmyndugleikum og løgreglu nakað at hugsa um.

Sjálvandi vilja tað altíð vera tíðir á degnum, har ferðslan er meira enn aðrar tíðir. Men okkara býarplanleggjarar eiga at geva hesum størri gætur, tí økta ferðslan í býnum, hvar tú enn er stæddur, gevur okkum nøkur signal um, hvussu kann verða stætt um ikki so langa tíð. Høvuðsstaðurin veksur jú við fullari ferð, og enn hava vit bert merkt rákan av eini møguligari oljuvinnu.

Lat tað verða sagt, at við Ringvegnum rundan um býin eru stórir batar hendir. Hesin gevur meira luft og gevur fólki betri møguleika at koma til og fara frá arbeiði. Men trupulleikarnir hvørva tó ikki fyri tað, um vit hava fingið ein stásiligan ringveg. Trýstið á miðbýin, har handilslívið er í støðugari menning, økist við hesi gongd. Tí er meira neyðugt enn nakrantíð við eini meiri miðvísari miðbýarplanlegging. Her mugu kommunalir myndugleikar og løgregla seta seg saman skjótast og stinga út í kortið eina skilagóða og munagóða planlegging ikki minst av komandi ferðsluæðrum og parkeringsplássum. Høgra hond má vita, hvat vinstra ger. Tað er kjarnan í hesi planlegging.

Vit hava fingið tey stór arbeiðspláss hvør sínu megin Kongabrúnna. Tá slík arbeiðspláss og onnur við í miðbýnum hava tørv á nógvum parkeringsplássum eigur at verða spurt, hvussu myndugleikarnar hava hugsað sær at nøkta henda tørv. Er tað hugsanin, at Skálatrøðin skal gera tað? Verða so ætlanir um bygging har til veruleika, hvat hava myndugleikarnir í býnum tá hugsað sær, at mongu fólkini til arbeiðis í miðbýarøkinum skulu seta sínar bilar? Skjótt koma so nýggja Norrøna og Smyril til landið, og bæði hesi risaskip skulu eisini halda til í sama miðbýarøki. Hvussu hevur kommunan hugsað sær at loysa ferðsluspurningin tá?

Spurningurin er, um vit ikki aftur eru við at gera somu mistøk, sum hava eyðkent planleggingina nú í mong mong ár. Vegna væntandi planlegging, her eisini landsplanlegging, verður bygt út og manorerað við høgru hond uttan at vinstra veit av tí, tvs. at nýggj arbeiðspláss gerast veruleiki uttan at tann harí knýtti ferðsluspurningurin er loystur. Havnin verður størri og størri, eitt nú er Kollafjørður vorðin partur av henni. Men tað tykist ikki sum um, at planleggjararnir sleppa at vera við til at seta út í kortið útviklingin. Ella sova teir?

Her er økta virksemið kring Eystaru bryggju kanska tað besta dømið. Her hevur tú eina farmahavn, eina ferðamannahavn til flutning bæði innanhýsis og millum lond, her hevur tú sjóverjuskipini, fiskiskipini, oljuskipini og soleiðis kundi verið hildið fram. Hevur eingin hugsað um, hvussu stór krøv hetta nógva trýst á miðbýin setir til myndugleikarnar?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Stjørnuskot sambandsfloksins nú høgt á føroyska politiska himmalinum

**Ólavur Petersen**
*Argir*

Leingi hevur hann verið ávegis, og nú skrivar hann seg sum Johan Dahl, løgtingsmaður fyri Suðuroynna.

Í Dimmu 2. juli bjóðar hann øllum føroyingum av, sum halda seg hava eitt lítið sindur av skili í sær.

Tað er kanska í so djarvt at taka ímóti avbjóðing frá manni sum so ríkiliga hevur prógva, at hann dugur so nógvar ferðir meira enn at mata sær.

Tí hvør av okkum øðrum stakkals mannabørnum megna at fara á fiskarí í Biscaya og Ermasundi, leggja fiskin á goymslu í Føroyum, fyri síðan at flyta fiskin í sama líki eins langt suðuraftur.

Góði Jóhan! Tú hevur stóra tøkk uppibornað.

Tí rokingina, sum vit føroyingar norðanfjørðs fingu hongda um hálsin, fyri at bjarga suðringum undan bankatroti, hevði verið uppaftur størri, vart tú ikki farin undir virksemi títt.

Men hví rokningin úr Suðuroy er so ovurhonds stór, er aftur ein gáta sum heldur ikki vanligt vit og skil megna at klára. Men nú suðringar hava valt garðamannin á Ting, so má tað vera tí, at teir vilja javna økonomiska begávilsi Johans út á allar okkum føroyingar.

Men kjeri Johan! Áðrenn tí hevur avprogrammerað alt vanligt vit og skil hjá okkum norðingum, so fortel okkum vælsignaður, hvat útjavningarskatturin frá okkum norðanfjørðsfólki er brúktur til í Suðri; men tað er kanska ov nógv kravt av sambandsmanni, at eftirtíðin skal fáa lut í søgu landsins.

Liberalisturin Jákup Mortensen, sáli, vildi tað øðrvísi, men hann var tikin av ovastu rók í sambandsflokkinum, tá hann sum tann einasti í tingbólki sambandfloksins atkvøddi fyri at fáa "nýggja" Smyril í sigling til Suðuroyar.

Skammiligt at manning sambandsfloksins snorksvav, meðan møguleiki var at koma í landsins stýri hesaferð, tí vit norðingar hava vissiliga brúk fyri heilakyknum Johan Dahls.

# Guð og Ísrael

**Finnur Jensen**



Tað hevur mær altíð verið ein gáta, hví summi kristin fólk, felagsskapir og enntá politiskir flokkar gera so nógv burturúr at rósa Ísrael út í odd og egg.

Eg dugi í øllum førum ikki at síggja nakað sum helst kristiligt í hasum hernaðarligu tiltøkum, sum eru farin og enn fara fram í Miðeystri - heldur tvørtur ímóti.

Og so at síggja sovorðin lesarabræv frá blindum føroyskum - ja, enntá donskum - ísraelsviðhaldsfólki, sum hvørki vilja viðurkenna, at palestinsk øki verða hersett ella at palestinsk smábørn verða skotin… tað er mær enn meira undrunarvert. Minnir meg ikki sørt um hasar nýnasistarnar, sum ikki vilja viðurkenna, at Holocaust fór fram undir øðrum veraldarbardaga.

Er tað veruliga kristindómur, at summi fólk í einum landi verða útvald at vera so heilag, at tey kunna ganga runt og spæla Fandango, sum teimum lystir???

Er tað veruliga so, at tað finst ein gudur, sum setur næstrarkærleikan til viks, og ístaðinfyri gongur inn fyri tí ræðuleika, sum herjar millum ísraelsmenn og palestinar?

Um so er, eg eri í einum stórum dilemma - tí ein sovorðnan gud tími eg í øllum førum ikki at trúgva uppá longur.

Í síðsta enda er spurningurin, um handa ísraelssamkenslan hevur nakað sum helst við kristindóm ella Guð at gera. Tað er vist bara ein góð umbering fyri at lata sín innara rasist sleppa leysan - í einum snøggum kristiligum hami - tí ein sovorðnan hava vit jú øll í búkinum, isje sannheit…

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Tíðindaskriv:

# Felagið fyri hoyribrekað 10 ár

**Í hesum døgum eru 10 ár síðan, at Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum var sett á stovn.**

Tað vóru norðurlendsku feløgini fyri hoyribrekað, sum á sinni tóku stig til, at felagið var stovnað. Hesi feløg samstarva í felagsskapinum Nordiska hørselsskadades samarbetskommité og til tess at fáa føroyingar við í hetta samstarv, gjørdu tey av at halda evnisdagar sínar í Føroyum í juli 1992. Hetta var gjørt í samráð við Meginfelag teirra brekaðu og við hollum stuðli frá starvsfólkum á Skúlinum á Trøðni. Fleiri áhugaðir føroyingar við hoyribreki tóku lut í evnisdøgunum og 11. juli 1992 varð tikið samanum og stovnandi aðalfundur hildin í felagnum, sum fekk navnið Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum.

Felagið hevur til endamáls at savna øll tey, ið á einhvønn hátt eru hoyribrekað – bæði tunghoyrd og deyvblivin t.e. tey, ið missa alla hoyrn, tá tey eru vorðin vaksin. Somuleiðis eisini tey, ið líða av Tinnitus og Meniére og felagið er eisini fyri foreldur at hoyribrekaðum børnum. Øll kunnu gerast limir í felagnum.

Tey, ið eru hoyribrekað, liva undir heilt øðrum treytum enn tey, ið eru fødd deyv. Tey deyvu hava sína ríku deyvamentan og teknmálið at samskifta við, meðan hoyribrekað ofta vera uttanfyri bæði millum tey hoyrandi og tey deyvu. Tað er ofta sera einsligt at vera hoyribrekaður. Tíverri eru alt ov mong, sum ikki orka at viðurkenna hoyribrek sítt, og hjá teimum verður trupulleikin enn størri. Felagið fyri hoyribrekað vil gera vart við, at tað er eingin skomm ikki at hoyra. Nógv hjálpartól eru til teirra, sum viðurkenna, at tey hava hoyribrek. Men vit mugu í fyrsta umfari sjálvi leita okkum hjálp.

Hesi 10 árini hevur felagið havt fundir minst 2 ferðir um árið. Evnini hava verið mong og alla tíðina hava vit eftir førimuni roynt at fylgt við í, hvussu umstøðurnar hjá hoyribrekaðum í Føroyum eru. Leingi var tað so, at vælferðin hjá hoyribrekaðum stóð og fall við einum persóni: ein oyrnalækni var í landinum og ein persónur arbeiddi á Hoyrnardeildini á Sernámsdeplinum. Hoyrnardeildin skuldi syrgja fyri, at hoyritól vórðu útflýggjað og tillagað. Hon var og er ein lívlína hjá okkum hoyribrekaðu, og tað er av allar størsta týdningi, at vit altíð kunnu fáa hjálp har, tá hoyritólið verður í ólagi ella okkurt annað er áfatt. Tá hugsað verður um, at tey, ið fáa hoyribrek at dragast við, ofta fáa tað sum arbeiðsskaða, tí at ov nógvur gangur er á arbeiðsplássi teirra, so er tað ikki meira enn rímiligt, at tey fáa so góða hjálp, sum gjørligt, ja, tá er hjálpin ikki ein útreiðsla hjá tí almenna, men ein vinningur, tí hjálpartólið kann halda tí hoyribrekaða í vinnu heldur enn at gerast bundnan at almennari forsorg.

Fyri stuttum flutti Hoyriklinikkin av Sernámsdeplinum og oman á Landssjúkrahúsið. Vit hava nú á fyrsta sinni serútbúgvið fólk á hoyriklinikkini og vónir um, at hoyriklinikkin fer at mennast, sum árini líða. Tað meta vit sum eitt stórt framstig.

Hesi 10 árini, ið farin eru, eru onkur framstig hend, men enn er nógv, sum treingir til bata og Felagið fer eisini framyvir at fylgja við í, hvussu umstøðurnar hjá hoyribrekaðum eru. Fyrst og fremst er tað okkara ynski, at hugsað verður um allan gangin í umhvørvinum uttan um okkum, sum skaðar hoyrnina hjá fólki. T.d. hugsa vit um tann harða tónleikin, sum gevur ungfólki hoyribrek at dragast við á alt yngri aldri, og um umstøðurnar umborð á skipi og í vinnuni sum heild. Verjið hoyrnina, tí tá hon er mist, fæst hon aldrin aftur og tað er missur, sum svíðir. Tað vita vit av ringum royndum.

Harumframt hevur felagið tvey stór føðingardagsynski:

1. At Sjónvarp Føroya fer at teksta føroyskar sendingar og fær tekstvarpið at virka, so at eisini vit fáa tíðindi um tað, ið fyrferst í samfelagi okkara.
2. At telelykkir verða á øllum almennum støðum og alla staðni, har nógv fólk savnast, so at eisini hoyribrekað kunnu fara til tónleik, sjónleik, fundir og onnur tiltøk og fáa tað við, sum sagt verður.

Øll hesi 10 árini hava vit so av og á heitt á Norðurlandahúsið um, at tey fáa sær eina virkandi telelykkju. Enn er einki hent. Tað er údsaligt, at fremsta mentanarhús í landinum, goldið av norðurlondum, skal vera so illa útgjørt.

Sjálvan føðingardagin 11. juli verður einki gjørt burturúr, men vit ætla at halda dagin seinni í ár. Felagið hevur nú umleið 200 limir. Í nevndini eru Nicolina Dahl, formaður, Katrin Rubeksen, Jórun Johannesen og Jákup Danielsen.








www.sosialurin.fo

Visti tú ikki tað? Sosialurin